# Karl Vidtfeldt 50 ár

Mikudagin 23. januar 2008 fylti Karl Vidtfeldt á Sandi 50 ár.

Karl er kendur sum bæði ítróttar- og vinnulívsmaður. Hann er útbúgvin bilmekanikari, og dagliga rekur hann saman við konuni Bil- & Maskinverkstaðin, og Statoil støðina á Sandi, sum hann eigur saman við beiggja sínum Rólanti Vidtfeldt. Saman hava teir eisini mjólkabilin og fleiri bussar, sum røkja rutuna í Sandoynni. Karl starvast eisini sum hjálparløgreglumaður.

Hann hevur verið ein av B71 undangongumonnunum og varð longu sum 15 ára gamal formaður felagsins. Sum ótroyttiligur B71-ari hevur hann havt stóran týdning fyri felagið og Sandoynna sum heild. Í nógv ár taldist hann eisini millum teir leikarar, ið vunnu felagnum heiður. Hann var við tá teir vunnu við 3. deildarliðnum í 1986, við 2. deildarliðnum í 1988, og tá teir gjørdust føroyameistarar í 1.deild í 1989.

Innan ítróttin hevur Karl havt mong álitisstørv. Síðan miðskeiðis í 90-unum hevur hann verið partur av nevndini í FSF. Har fekk hann møguleikan at gera sína ávirkan galdandi í Fótbóltssambandinum. Hansara ídni og førleiki á nógvum ymiskum økjum hevur havt stóran týdning fyri føroyskan fótbólt. Eitt sereyðkenni við Karl er hansara lætta sinni og førleikin at síggja møguleikar heldur enn trupulleikar.



*Karl Vidtfeldt við HM-steypinum hjá Italia. Myndin er tikin í Modena í Italia í fjør*

Hóast rímiliga høgan fótbóltsaldur er Karl enn virkin í old boys fótbólti. Í fjør var hann partur av liðnum, ið vann FM-heitið fyri fyrstu ferð.

Karl er giftur við Annu Sofíu, f. Poulsen, úr Skopun, og eiga tey saman fýra børn: Eyðnu, Kristoffur, Jóhannu Mathildu og Elsubet. Barnabørnini eru Markus og Edit Simona.

Føðingardagurin verður hildin í Virkinum á Sandi leygarkvøldið 9. februar frá kl. 19, har øll eru vælkomin.

## Andlát og jarðarferðir

**John (Jonn) Andreasen** í Havn andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 56 ára gamal.

**Anders A. Andersen,** ættaður úr Lopra búsitandi á Strondum, andaðist á Landsjúkrahúsinum týsdagin 79 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Sjóvar Kirkju leygardagin kl. 14. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Svanhilda Poulsen** við Neyst, Hvalba, andaðist á Suðuroyar Sjúkrshúsi mikukvøldið, 87 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin klokkan 18. Jarðaferðin verður úr Vitninum sunnudagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Svanhildu kunnu lata Vitinum eina peningagávu. Konta í Eik.

**Trygvi Vestergaard,** ættaður úr Lopra búsitandi í Tórshavn, andaðist týsdagin, 60 ára gamal.

**Nikael Tomsen** í Hoydølum andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 91 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Hoyvíkar Kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Nikael, kunnu lata Hoyvíkar kirkju eina peningagávu.

---

## Diamantbrúdleyp

14. februar 2008 kunnu

## Mathilda og Fríðrik Poulsen

Klaksvík

halda 60 ára brúdleypsdag

Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansheimi frá kl. 18-23. Øll eru hjartaliga vælkomin.



*Tíðin rennur sum streymur í á ...*

## Dagurin

**9. februar. Appolonia**, deyð umleið ár 250. Ein kona í Aleksandriu, sum fyri trúar sakir varð pínd og dripin. Halgisøgan sigur, at hon fekk allar tenninar trektar út og varð síðani brend á báli. Hon er verndarhalgimenni hjá tannlæknum. Navnið er eftir grikska gudinum Apollon, hin ljómandi.

**10. februar. Scholastica,** deyð umleið ár 542. Tvíburasystir Sankta Bænadikt, sum stovnaði eina munkaskipan, sum skjótt kom víða um lond.

**11. februar. Kongadagur.** Ta náttina í 1659 søktu svensk herlið at Keypmannahavn, men atsóknin miseydnaðist. Navnið kongadagur sipar til báðar kongarnar, sum stóðu á odda í stríðnum, tann danska Fríðrik III og tann svenska Karl X Gustav. Sagt varð, at versta tíðin til veður var millum konganna, tað er frá trettanda (teir tríggir heilagu kongarnir) og til kongadagin. Fyri trúar sakir varð pínd og dripin. Halgisøgan sigur, at hon fekk allar tenninar trektar út og varð síðani brend á báli. Hon er verndarhalgimenni hjá tannlæknum. Navnið er eftir grikska gudinum Apollon, hin ljómandi.

## 50 ár

Mikudagin 23. januar 2008 fylti Karl Vidtfeldt á Sandi 50 ár. Føðingardagurin verður hildin í Virkinum á Sandi leygarkvøldið 9. februar frá kl. 19, har øll eru hjartaliga vælkomin.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri sonur, bróðir, pápi og verfaðir

**John Andreassen**

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsmorgun 5. februar 2008, 56 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum leygardagin 9. februar kl. 15.30. Jarðarferðinr verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin 10.februar kl. 14.30.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ragnhild, Martin og synirnir Ímund og Áslak**

## Tak

Tak for alle blomsterne og den opmærksomhed, der var ved

**Regin Havn Rasmussens**

begravelse.

*Kærlig hilsen*
**Birte Rasmussen med familie**

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at okkara góði pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Nikael S. Thomsen**

andaðist á Landssjúkrahúsinum týskvøldið 5. februar 2008, 91 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 16.00. Jarðarferðin verður úr Hoyvíkar kirkju leygardagin 9. februar kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Súsanna, Anna, Sølva og Ólavur**

*Í staðin fyri blómur ella krans, kann ein gáva latast Hoyvíkar kirkju.*